# Bjarti Mohr út í Evropa at royna seg

**Bjarti Mohr hevur keypt gamla Heygadrang aftur til Føroya. Men hann skal fiska undir ES flaggi og fær sostatt atgongd til fiskileiðir heilt úr Afriku og norður til Svaldbard**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Gamli Heygadrangur er nú aftur á føroyskum hondum. men hann fer at fiska undir ES flaggi, har hann fær umfatandi fiskirættindi*

Gamli Heygadrangur er nú aftur á føroyskum hondum! Bjarti Mohr hevur keypt gamla Heygardang, ella Orcades Viking, sum hann eitur nú, aftur til Føroya.

Hann hevur keypt skipið saman við einum íslendingi, men tað er føroyingurin, sum eigur tveir triðingar av skipinum.

Bjarti Mohr sigur, at keyparar og seljarar eru samdir um ikki at upplýsa prísin, men hann sigur, at báðir partar eru nøgdir.

Kortini kann sigast, at Orcades Viking hevur verið lýstur til sølu fyri 5,5 milliónir ensk pund, tað eru góðar 60 milliónir krónur.

Men Orcades Viking kemur ikki at fiska undir føroyskum flaggi.

Teir báðir, sum hava keypt skipið, hava eisini keypt eitt felag í Niðurlondum, sum hevur ymisk fiskirættindi og harvið fáa teir atgongd til fiskirættindini hjá ES londunum. Eisini í tí felagnum eigur Bjarti Mohr tveir triðingar. Sostatt fer Orcades Viking at fiska undir niðurlendskum flaggi.

Men afturfyri fær hann fiskirættindi helt út Afriku og norður til Svaldbard.

– Hann hevur sera stórar møguleikar at fiska og gongur ikki heilt illa, fer hann ikki at klára at fiska kvoturnar upp, sigur Bjarti Mohr.

Í løtuni liggur Orcades Viking í Las Palmas, men nýggju eigararnir fara eftir honum í morgin og hann kemur til Føroya um einar 14 dagar.

Síðani skal skulu ymsar ábøtur gerast við hann, áðrenn hann fer til fiskiskap.

Einir 60 mans verða knýttir at skipinum, men 40 mans eru við hvørja ferð og so skiftast teir um at vera umborð. Av teimum vera fleiri føroyingar, eitt nú yvirmenninir, men eisini á dekkinum. Annars verða russarar og aðrar tjóðir, við.

### Mugu royna nýggjar leiðir

Okkum vitandi er hetta ein nýggj roynd í føroyskari fiskivinnu.

– Tað sær út til at trongja samanum hjá okkum, og vit missa fleiri og fleiri rættindi á fjarleiðum. Sostatt er neyðugt at royna nakað nýtt, sigur Bjarti Mohr.

Tí hava teir nú fingið sær fótin fastan innanfyri ES.

Hann sigur, at Orcades Viking kann troyta fjølbroyttan fiskiskal tí hann hevur rætt at fiska bæði svartkjaft, sild, makrel, hestamakrel, umframt sardinur undir Afrika og Kongafisk í Irmingarhavinum.

Hann skal fiska fyri einar 30 milliónir um ári fyri at standa seg, og gongur tað bara nøkunlunda, væntar Bjarti Mohr ikki,at tað verður nakar trupulleiki við teimum rættindum, hann hevur.

### Tvey bein

Frammunundan eigur Bjarti Mohr eitt annað skip til uppisjóvarfisk. Tað er Sheanne, men hann hevur onga frystilast.

– Endamálið var at fáa eitt bein afturat at standa á og tí hava vit í eitt ár leitað eftir einum ídnaðarskipi við frystilast, sigur Bjarti Mohr. Sostatt hava teir nú eitt ídnaðarskip við feskum vørum og eitt við frystilast. Hann sigur at Orcades Viking frystir 140 tons av heilfrystum uppisjóvarfiski um døgnið.

Hann hevur eisini fingið spildurnýggjan motor upp á 5. 000 hestar.

Men í sambandi við frystingina umborð, er hann eisini útgjørdur til at fiska í bæði heitum og køldum sjógvi. Og somuleiðis er hann úytgjørdur til at avskipa fisk á víðum havi til móðurskip og hann kann eisini taka ímóti fiski frá øðrum skipum úti á víðum havi.

Bjarti Mohr sær stórar møguleikar í frystum uppisjóvarfiski, bæði í Kina og aðrastaðni.

– Tað er ein spennandi marknaður, sigur hann.

Hann hugsar bæði um uppisjóvarfisk til matfisk og um at selja ídnaðarfisk til virki at virka ymsar vørur burturúr.

Bjarti Mohr heldur avgjørt, at hetta verður ein partur av framtíðar fiskivinnuni í Føroyum at keypa seg inn í útlendsk feløg.

Hann vísur á, at hetta er eitt, sum íslendingar hava gjørt rættiliga nógv við og íslendsk feløg eiga nú ein stóran part av týsku fiskivinnuni, bæði á sjóvi og landi, eins og teir hava keypt seg inn í feløg í Fraklandi og Onglandi, sum bæði eiga skip og virki.

– Orcades Viking verður klassaður í Norsk Veritas og ætlanin er at tryggja hann í Føroyum.

Orcades Viking er 73 metrar langur og 13 metrar breiður og hann lastar 900 tons.

Orcades Viking er bygdur á Skála í 1991, men varð síðani seldur til Orknoyar. Haðani varð hann seldur til Íslands og nú er hann so keyptur aftur til Føroya.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Núpur og Jákup B landaðu fríggjadagin

**Flestu línuskip í Klaksvík hava ligið ein part av summarinum, tá ið fiskidagarnir fóru at ganga undan. Skipini eru nú riggaði til aftur og eru so smátt byrjaði at fara útaftur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Kósin í Klaksvík er eitt rættiliga fleksibult virki, sum keypir og arbeiðir flestu fiskasløg og hevur at kalla allar framleiðslur*

**Klaksvík:** Á Kósini í Klaksvík høvdu tey bert stongt í eina viku í summar. Hetta var í ólavsøkuvikuni. Annars hevur verið arbeitt alla tíðina, og fólk hava lagt sær summarfrítíðina til rættis, soleiðis sum tað nú einaferð hevur passað best.

Egil Johansen sigur, at hóast flestu línubátar í Klaksvík hava ligið nú uppundir endan av fiskiárinum, tí dagarnir vóru farnir at ganga undan, so hevur kortini væl av fiskaarbeiði verið á Kósini.

– Vit keypa fisk beinleiðis frá skipunum, serliga línubátunum, eins og vit keypa fisk á uppboðssølu.

### Mest hýsa

Seinasta fríggjadag keypti Kósin veiðina hjá línuskipunum, Núpi og Jákupi B, sum høvdu eini 70.000 og 90.000 pund hvør. Núpur royndi á leiðini í ein útnyrðing úr Mykinesi, og Jákup B var á Føroyabanka.

Egil sigur, at meginparturin av veiðini hjá skipunum hendan túrin var hýsa.

– Lítil toskur hevur sum heild verið uppi í veiðini seinastu tíðina, og sjálvt um Jákup B var á bankanum hendan túrin, høvdu teir lítið av toski.

Hann sigur, at ein stórur partur av veiðini hjá línuskipunum í summar hevur verið longa og brosma.

Mánadagin arbeiddu tey hýsu á Kósini og á Roykivirkinum, Pure Wather, sum Kósin nú eisini eigur saman við øðrum.

– Sum er, roykja vit bara hýsu. Vit hava eisini roykt laks, men í løtuni verður eingin laksur roykt, sigur Egil.

### Øll fiskasløg

Kósin í Klaksvík er annars eitt rættiliga fleksibult virki, sum keypir og arbeiðir flestu fiskasløg og hevur at kalla allar framleiðslur.

– Umframt flakaframleiðslu av ymiskum slagi, sum fer til frystingar, hava vit eisini saltfiskaframleiðslu og royking, sigur Egil.

Mánadagin, tá ið vit frættu úr Klaksvík, lógu einir 7-8 smáir útróðrarbátar landingarklárir. Onkur hevur verið við línu og onkur við snellu. Bátarnir selja um uppboðssøluna, har fiskurin verður seldur sum útróðrarfiskur.

Egil Johansen veit annars at siga, at lítil útróður hevur verið í summar, men hann væntar, at útróðurin fer at taka seg uppaftur so hvørt, sum tað líður úr á heystið.

# Fullir undir lúkurnar av upsa

**Í síðstu viku landaðu partrolararnir, Vesturtúgvan og Grønanes, eini 260.000 pund av upsa og øðrum fiskasløgum í Miðvági og Vestmanna**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í Miðvági arbeiða tey hýsu og upsa. Einstøk skip leggja veiðina upp í Miðvági, men í flestu førum kemur fiskurin, sum virkið keypir, vestur í bili*

**Miðvágur:** Partrolararnir, Vesturtúgvan og Grønanes, gjørdu ein góðan túr í nøgd í síðstu viku.

Vesturtúgvan, sum landaði í Miðvági, hevði eini 120.000 pund av upsa og eini 10.000 pund av toski, hýsu og øðrum fiskasløgum. Grønanes, sum landaði í Vestmanna, hevði umleið somu nøgdir av fiski.

Jason Johannesen, virkisleiðari á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági, sigur, at bæði skipini vóru full undir lúkurnar.

### Smáur fiskur

Hann sigur, at upsin framhaldandi er rættiliga smáfallandi, og tað er hýsan, sum virkið keypir, eisini.

– Í fyrsta lagi royna vit at fáa fatur á hýsu, men tá ið ov lítil hýsa er á marknaðinum fyri líkinda prís, keypa og arbeiða vit upsa. Toskin gera vit einki við; hann fer til onnur virki, eitt nú til saltfiskavirkið á Toftum.

Virkisleiðarin sigur, at flestu fiskasløg eru bleyt hesa tíðina av árinum, og serliga plagar august mánaði at vera hin ringasti í so máta.

– Tað er lýtt í veðrinum, og nógv reyðæti er í fiskinum. Flestu skipini gera stuttar túrar, og sjáldan eru túrarnir longri enn einar átta og í mesta lagi tíggju dagar. Men hóast túrarnir eru stuttir, blotnar fiskurin skjótt undir hesum umstøðum.

Sagt verður frá nógvari ræðæti vestanfyri.

### Mest í bili

Meginparturin av fiskinum, sum arbeiddur verður í Miðvági, kemur í bili, men tað merkir ikki, at virkið ikki eisini keypir nógvan fisk beinleiðis frá skipunum.

– Tað gera vit, sigur Jason Johannesen og vísir á, at fiskurin í flestu førum verður landaður aðrastaðni og fluttur í bili í Vágarnar.

Vesturtúgvan landar tó fyri tað mesta í Miðvági og Grønanes í Vestmanna.

Virkisleiðarin sigur, at rættiliga støðugt fiskaarbeiði hevur verið í Miðvági seinastu tíðina, men seinasta fríggjadag var einki at gera.

– Vit keyptu eisini fisk hendan dagin, men hann kom so seint vestur. Tí lá hesin fiskurin niðurfyri til mánadagin og týsdagin.

Mánadagin hevði virkið í Miðvági tískil 32.000 pund av hýsu og stívliga 40.000 pund av upsa inni.

Hvussu hendan vikan annars kemur at roynast, dugdi Jason Johannesen ikki at siga, tá ið vit frættu mánadagin.

– Men vit vænta, at Vesturtúgvan og Grønanes koma innaftur at landa í hesi vikuni, sigur virkisleiðarin, ið annars dúvar hýsu og upsa, sum verður á marknaðinum hesa vikuna.

# Svartkjaftatrolarar fáa upsa og tosk

**Ísfiskatrolarar, sum royna undir Føroyum, hava eisini fingið meira av smáum upsa enn vanligt á djúpri vatni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mong munnu spyrja, hvar tann stóri gýtingarfiskurin er, tá ið rættiliga nógvur smáupsi er at fáa, men lítil og eingin stórur fiskur.

Tað eru teir, sum fylgja við í fiskivinnuni, ið halda, at tá ið føðin minkar, er tað í fyrsta lagi tann stóri fiskurin, sum fer út at leita sær eftir føði, meðan tann smái fiskurin heldur seg nærri landi og inni á landgrunninum.

Sosialurin hevur frætt, at uppi í veiðini hjá eitt nú svartkjaftatrolarum hava nøgdirnar av stórum upsa, toski og partvís hýsu seinastu 3-4 árini verið størri enn vanligt.

Samstundis hava ísfiskatrolarar, sum royna undir Føroyum, fingið meira av smáum upsa enn vanligt á djúpri vatni.

Kanska er tað so, halda fiskimenn og teir, sum varða av vinnuni, at tann stóri fiskurin sveimar meira, enn áður hildið, tá ið føðin minkar, meðan tann smærri fiskurin í størri mun heldur seg nærri landi, sum nú einaferð liggur til hansara náttúru.

Sosialurin fer í einum øðrum blaði at venda aftur til hendan áhugaverda spurningin.

# Smáfallandi upsi og hýsa

**Fiskifrøðingar halda, at smái upsin er eitt tekin um, at royndin er ov stór. Fiskurin sleppur ikki at veksa, áðrenn hann verður tikin. Fiskimenn halda hinvegin, at toskurin er so illa fyri í løtuni, tí upsin hevur yvirtikið landgrunnin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara upsin, sum seinastu árini hevur verið nógvur og rættiliga smáur. Sama er eisini við hýsuni, sum nógv vísir seg at vera til av.

Á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, sigur Jason Johannesen, virkisleiðari, at eini 60% av hýsuni, sum virkið keypir, er 3’arar. Tað merkir, at 60% av hýsuni hjá skipunum vigar niðanfyri 800 gram. Nakað er eisini av 4’arum, og tað er rættiliga smá hýsa.

Hann sigur, at bert ein lítil partur av veiðini hjá skipunum er stór hýsa.

– Fiskurin er misjavnur til dygdar, nú tað er lýtt í veðrinum, og fiskurin er leysur í kjøtinum.

Sambært fiskimonnum, sigur Jason, at nógv reyðæti er í sjónum, og tað ger eisini, at fiskurin blotnar skjótt, hóast túrarnir ikki eru langir.

Virkisleiðarin sigur, at fiskurin í hýsuni hjá línubátunum er betur enn hjá trolarunum, tí trolararnir tóga leingi, meðan ein og ein hýsa kemur inn um lúnningin hjá línubátunum.

- Hinvegin er hýsan hjá trolarunum sum heild feitari enn hjá línubátunum, sigur Jason Johannesen at enda.

### Loynidómar

Upsin hevur leingi verið smáur, men nógv hevur verið til av honum.

Nú er so tað sama galdandi við hýsuni, sum eisini vísir seg at vera nógv til av.

Fiskifrøðingar halda, at smái upsin er eitt tekin um, at royndin er ov stór. Fiskurin sleppur ikki at veksa, áðrenn hann verður tikin.

Fiskimenn halda hinvegin, at toskurin er so illa fyri í løtuni, tí upsin hevur yvirtikið landgrunnin.

Spurningurin er so, um hýsan er so smáfallandi, tí royndin eftir henni eisini er ov stór.

Náttúran goymir sínar loynidómar, og tað kann vera torført at vera fiskifrøðingur, tá ið náttúran ikki háttar sær eftir »bókini«.

Tað ger hon minni enn so altíð…